## DAGSINS MEINING

# Undirgrundin

Fjølmiðlar og onnur fokusera framvegis uppá heldur løgnu diskussiónina um undirgrundina, har Dansk Folkeparti og Ekstra Bladet eru sloppin at seta dagskránna á tí støði, ið hesi bæði eru von at leggja. Serliga verður tosað um ognarrætt.

Ognarætturin er eitt rættiliga irrelevant hugtak í undirgrundardiskussiónini, tí man rennir seg altíð fastan í definitiónsspurningar. Hugtøkini av týdningi eru yvirvaldsrættur og dispositiónsrættur.

Yvirvaldsrætturin yvir undirgrundini og øllum øðrum í Føroyum er danskur undir Heimastýrisskipanini, men kann man kalla tað ognarrætt? Er tað ognarrættur at hava yvirvaldsrætt yvir undirgrundini uttan nakrantíð at kunna disponera yvir tí, sum er í henni ella avgera, hvør skal útvinna? Neyvan. Er tað ognarrættur at kunna disponera frítt yvir undirgrundini til allar ævir og avgera, hvør skal útvinna og hvussu nógv hesir skulu gjalda í skatti til føroyska landskassan, men ikki hava yvirvaldsrættin? Hetta er ivaleyst nærri ognarrætti enn við yvirvaldsrættinum, men man vil altíð fáa eina akademiska diskussión uttan praktiskan týdning, um hettar er veruligur ognarrættur.

Ognarrættur er eitt hugtak, sum er malplacerað í hesari debattini, tí tað vil altíð enda við problematiskum definitiónsdiskussiónum.

Danir vilja ongantíð svara greitt um ognarrætt, tí at teir vilja ikki váða at siga nakað, sum kann seta spurnartekin við “højhedsretten” og grundlógina. Fjølmiðlar og Dansk Folkeparti hava tíverri tendens til at tosa um ognarrætt sum um talan er um vanligt keyp og sølu.

At danir eiga oljuna, sum danskar keldur eru endurgivnar fyri at siga, er ikki rætt. Onkur kann argumentera fyri, at danir gjøgnum sín yvirvaldsrætt eiga klettarnar, ið oljan spríkir úr, men oljuna eiga teir ongantíð, tí dispositiónsrættin hevur føroyska heimastýrið.

Løgið er, at eingin dregur paralellar millum kongsjørðina og undirgrundina. Kongsjørðin bleiv yvirtikin í trýssunum. Danir hava yvirvaldsrættin yvir kongsjørðini akkurát sum við undirgrundini og øllum øðrum, men eingin gongur og setur spurningar við, um danskarar eiga jørðina - sammetast við undirgrundina ella seyðin -sammetast við oljuna. Her eru allir føroyingar á einum máli, og eingin munur átti prinsipielt at verið á undirgrundini og kongsjørðini.

**Sosialurin**

## NØVN Í VIKUNI

### Eitt kært minni um Arnhild Sivertsen, við Gjógv

3. febr. 2001 varð hon kallað heim til Harran.

Arnhild varð fødd 29. okt. 1931, dóttur Mariannu og Petur Joensen, við Gjógv.

Abbi hennara var Petur Chr. Joensen og omman var Henrietta Joensen, við Gjógv. Petur Chr. Joensen hevði handilin og postin við Gjógv, og tá ið hann doyði, tók pápi Arnhild, Petur Joensen, á seg handilin og postin og hevði hann líka til hann doyði í 1985. Eftir tað tók Arnhild alt upp á seg, til handilin læt aftur fyri nøkrum árum síðan. Hon hevði eisini postin, sum er eitt ábyrgdarfult arbeiði. Gekk hvønn dag í hvørt hús í bygdini við posti og hetta gjørdi hon til fullnar.

Arnhild giftist við Sofus Sivertsen frá Gjógv og tey fingu tveir dreingir, Petur Meinhard og Kristjan Andrass. Arnhild misti mannin í 1976, og tá vóru teir smádreingir. So ábyrgdin var stór. Nógv var at gera við hoyggi, velta eplir og síðan seyðurin o.s.fr.

Arnhild misti mammu sína, tá hon var í 2–3 ára aldri og tá var fastir hennara Alexandra um 20 ára aldur og tók sær av henni har í húsinum.

Alexandra og Ólafur Guðmundsson giftust 6. apríl 1968. Alexandra doyði 1. august 1977. Síðan eg kom at kenna Arnhild fyri uml. 15 árum síðan hevur ein hjartaligur felagsskapur verið knýttur millum okkum báðar. Minnist fyrstu ferð, tá eg saman við Ólafur Guðmundsson kom inn til Arnhild og húski, tann kærleikshitan ein merkti og blíðskapur, ja, soleiðis hevur tað verið øll hesi árini, líkamikið nær tú kom til Gjáar.

Vit báðar vóru góðar við hvørja aðra og kundu altíð hjálpast at við ymiskum eisini, tá hon vitjaði í Havnini.

Tað, sum gleddi Arnhild mest av øllum var ommudótturin, sum Kristjan Andrass og Britta svigardótturin eiga, sum nú er skjótt hálvtannað ár. Tey búgva í Danmark.

Ja, saknurin er stórur hjá okkum øllum, sum varða av, og tað verður tómligt at koma til Gjáar og eingin Arnhild er. Harrin verði við tykkum og hjá tykkum, Petur Meinhardi og Kristjan Andrassi.

Friður verði við minninum um Arnhild.

**Anna Oluffa Sloan**

# Hald steðgar sjónleiki



*Kristina Hansen*

Sjónleikurin “Eitur nakað land weekend” er bara sýndur einaferð og tað var seinasta leygarkvøld. Sunnudagin var ein av leikarunum Kristina Hansen, so óheppin, at tá hon skuldu lyfta dóttrina, at hon fekk eitt hald í ryggin. Hon kom undir læknahond og tá blaðið fór til prentingar í dag, var enn ikki greitt nær leikurin verður uppaftur tikin.

**je**


## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá okkara elskaða mamma, vermamma og omma

**Fríðbjørg Jacobsen**
**Sørvágur**

so brádliga fór frá okkum. Tøkk fyri alla ta góðu hjálp vit fingu til jarðarferðina og ervið. Tøkk fyri blómur, kransar og gávur til Sørvágs Kirkju. Tøkk til berarar, sangarar og kirkjutænarar og til David Johannesen, prest, fyri troystarrík orð í kirkjuni. At enda ein hjartans tøkk til tykkum øll, sum fylgdu mammu okkara til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*

**Børnini**



Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo

Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Mentan:**
Birgir Kruse birgir@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.




# Tolið hjá pedagogum uppi

**Allan mánadagin bíðaði Føroya Pedagogfelag eftir svari uppá fyrispurning um, hvørjir kommunalir felagsskapir eru góðkendir av landsstýrinum.**
**– Tað tykist sum lógardeildin ber seg undan at svara, sigur Carita Björklund, forkvinna í Føroya Pedagogfelag**

SAMRÁÐINGARRÆTTUR
*Turið Kjølbro*

Føroya Pedagogfelag er ikki sinnað at bíða longur. Hendir einki nýtt í málinum um, hvør skal samráðast við felagið um nýggjan sáttmála fyri teir 500 limirnar, sum arbeiða á dagstovnum, vøggustovum, frítíðarskúlum og sum dagleiðarar, ger felagið bart. Og felagið tekur ikki gladbeint av innbjóðingini frá Føroya Kommunala Arbeiðsgevarafelag um at koma til samráðingar, tí felagið ivast stórliga í, um allar kommunurnar eru umboðarar í felagsskapinum. Allan mánadagin bíðaði felagið eftir svari uppá fyrispurning um, hvørjir kommunalir felagsskapir eru góðkendir av landsstýrinum, men einki svar kom.

– Tað tykist sum lógardeildin ber seg undan at svara, sigur Carita Björklund, forkvinna í Føroya Pedagogfelag.

Hóast Føroya Kommunala Arbeiðsgevarafelag í innbjóðingini sigur seg umboðað føroysku kommunurnar, reisir Pedagogfelagið ivaspurningin.

– Vit kunnu vísa á, at fleiri dagstovnar eru, har kommunan ikki er við í nøkrum kommunalum felagsskapi. Tískil hevur hesin felagsskapurin ikki heimild at samráðast teirra vegna. Annað er, at ein triðingurin av dagstovnunum eru sjálvsognarstovnar, sum hava sjálvstøðuga nevnd. Og tað ger støðuna upp aftur meiri fløkta.

### Allir limir sama sáttmála

Hóast forkvinnan í Pedagogfelagnum áður hevur sagt, at felagið als einki hevur ímóti at samráðast við kommunurnar, dugir hon at síggja fleiri fyrimunir í, at tað er Fíggjarmálastýrið, sum situr hinumegin borðið, tá samráðast skal.

– Kjarnan í stríðnum hjá okkum er, at allir okkara limir fáa sama sáttmála, og at vit ikki brúka óneyðuga tíð uppá samráðingarnar, endurtaka krøv og grundgevingar og so framvegis. Kommunurnar hava ikki ein felagsskap, sum umboðar allar kommunurnar, tí er frægast at samráðast við Fíggjarmálastýrið, sigur forkvinnan, sum vísir á orðini hjá Helenu Dam á Neystabø, fyrrverandi landsstýriskvinnu, ið á tingi hevur sagt, at tað er Fíggjarmálastýrið felagið skal samráðast við júst orsakað av hesum.

– Hinvegin er ein loysn, at ein góðkendur felagsskapur saman við Fíggjarmálastýrinum samráðst við okkum, tí uttan mun til hvat, skal Fíggjarmálastýrið góðkenna sáttmálan. Tá ið vit samráðast um serstovnaøkið í Fíggjarmálastýrinum, er Almanna- og heilsumálastýrið eisini umboðað. Tí er tað natúrligt, at ein góðkendur kommunalur felagskapur er umboðaður, tá ið vit samráðast um dagstovnaøkið. Krøvini hjá okkum eru generell krøv um longri frítíð, styttri arbeiðstíð og annað. Og eg seti spurnartekin við, um kommunurnar skulu taka støðu til hetta, sigur Carita Björklund.



*– Kjarnan í stríðnum hjá okkum er, at allir okkara limir fáa sama sáttmála, sigur Carita Björklund, forkvinna í Føroya Pedagogfelag*

### Tiltøk?

Føroya Pedagogfelag hevur líka síðani dagstovnalógin var fyri á tingi í fjør, hildið seg til orðini hjá Helenu Dam á Neystabø um, at Fíggjarmálastýrið er samráðingarpartnarin hjá Pedagogfelagnum. Løgmaður vísti í samrøðu í blaðnum í síðstu viku á, at lógarinnar bókstavur gongur fram um, tað sum verður sagt á tingi.

– Løgfrøðingurin hjá okkum er ikki samdur við løgmanni í tí, sigur Carita Björklund.

Føroya Pedagogfelag fer inn í triðju viku í dag, har knúturin um samráðingarrættin ikki er loystur. Tolið er uppi, og nevndin er ikki sinnað at bíða longur. Hinvegin vil forkvinnan í felagnum ikki siga, hvørji stig felagið tekur, um einki nýtt hendir í málinum.

– Vit hava ongan sáttmála, ongar samráðingar eru byrjaðar enn, so vit hava møguleikan at gera tiltøk. Ting kunnu henda alla tíðina, sigur Carita Björklund.

Hendir einki, er ikki óhugsandi, at felagið setir tiltøk í verk. Arbeiðssteðgur hevur verið nevndur, og tað hevði merkt, at 500 pedagogar leggja arbeiðið niður og fara heim...

# Barsilsskipanin loksins fyri tingið aftur

**Á tingfundinum í gjár varð álitið um nýggja barsilsskipan lagt fram**

BARSILSLØN
*Turið Kjølbro*

Vinnunevndin hjá løgtinginum er loksins liðug við at viðgera uppskotið um nýggja barsilsskipan. Á tingfundinum í gjár varð álitið um nýggja barsilsskipan lagt fram og onnur viðgerð av uppskotinum verður helst hósdagin.

Uppskotið um nýggja barsilsskipan hevur ligið í vinnunevndini í tveir mánaðir. Orsøkin til, at tað hevur tikið so langa tíð, er, at lutvíst hava nógv stór mál verið fyri í nevndini og lutvíst hevur uppskotið kravt eina neyvari viðgerð, enn upprunaliga roknað varð við. Formaðurin í vinnunevndini, Heini O. Heinesen, segði í samrøðu við blaðið fyri tveimum vikum síðani, at uppskotið var ikki nóg væl úr hondum greitt úr Vinnumálastýrinum. Hesi orð hevur hann kortini ikki hug at endurtaka, nú vit aftur hava hitt hann á máli um uppskotið.

– Vinnumálastýrið hevur ein dugnaligan løgfrøðing. Hinvegin er uppskotið ógvuliga tekniskt og umfatandi, og tá ið vit bara hava fund eina ferð um vikuna, kann tað ikki avgreiðast skjótari, sigur Heini O. Heinesen.

Tað er ein samd nevnd, sum skrivar undir álitið um nýggja barsilsskipan. Formaðurin í vinnunevndini sigur, at álitið er í høvuðsheitum í tráð við upprunauppskotið. Onkur grein hevur kortini voldað trupulleikar, eitt nú grein 11 í uppskotinum, sum sigur, at rætturin til barsilspening er treytaður av, at móttakarin í minst seks mánaðir innan teir síðstu 12 mánaðirnar áðrenn fráverutíðarskeiðið hevur havt so mikið av arbeiði, at inntøkan í hesum tíðarskeiði hevur verið 10 prosent av lønini sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðsgevara og Føroya Arbeiðarafelag.

– Ætlanin hjá nevndini var at strika hesa greinina. So verður ikki, ístaðin hava vit strikað markið niðureftir, sigur Heini O. Heinesen.

Eftir ætlan fær nýggja barsilsskipanin gildi frá 1. juni. Síðani uppskotið varð lagt fyri tingið 21. des. í fjør, er Vinnumálastýrið í samráð við Arbeiðsloysistryggingina, sum skal umsita skipanina, komin eftir, at innkrevjingarskipanin kann gerast einfaldari og minni arbeiðskrevjandi enn roknað varð við av fyrstan tíð.



*Í dag eru tríggir mánaðir síðani landsstýrismaðurin í vinnumálum legði uppskot um nýggja barsilsskipan fyri tingið. Fyrsta viðgerð var í januar og onnur viðgerð verður í vikuni, helst longu í morgin. Myndin er tilvildarliga vald*

## Sjúkrasystrafelagið nýggja nevnd

FAKFELAG
*Turið Kjølbro*

Nýggj nevnd og nýggj forkvinna hava tikið við leiðsluni í Sjúkrasystrafelag Føroya. Jana Dalsgaard er vorðin forkvinna. Í grein í blaðnum í gjár er eitt navn komið skeivt fyri. Nevndin í felagnum er hendan. Jana Dalsgaard, Óluva Lómstein, næstforkvinna, Anna Maria Simonsen, Æna Reinert, Hervør Eidesgaard, Turið Zachariasen og Elsa Vest, nevndarlimir, og Anna Samuelsen, eykalimur.